# Miðlahúsið virkin partur av ólavsøkuni



Fjórða árið á rað var Miðlahúsið í Vágsbotni partur av stóra ólavsøkuhátíðarhaldinum. Dyrnar vórðu latnar upp longu fríggjadagin 25. juli við framsýningini við tekningum hjá Óla P. Síðani fór spennandi nýbrotið innan føroyskan film og mentan, Føroyskar søgur av bakkastokki við samkomu, har brot úr DVD, sum kemur út um stutta tíð, vórðu víst alment fyri fyrstu ferð. Hesi filmsbrot vórðu víst alla ólavsøkuna og fleiri hundrað ólavsøkugestir leitaðu sær innar á gólvið í Miðlahúsinum at síggja filmsbrotini, sum mugu sigast at vera ein stór succes longu. Tónleikatiltøkini fyltu eisini Miðlahúsið alla ólavsøkuna, har lagt varð út við Yggdrasil og SIC. Eftir teir komu Spælimenn, Lena Andersen, Stanley Samuelsen og Hanus G. Johansen. Eisini uttan fyri Miðlahúsið, á Nólsoyar Pálstorginum var stórt tiltak, tá Listavirðisløn Miðlahúsins varð latin Stanley Samuelsen og Hanus G. Johansen. Og ólavsøkan endaði við einum braki av einum tiltaki, tá alternativ ólavsøkurøða varð hildin á loftinum í Miðlahúsinum. Hon savnaði ta størstu fjøld av fólki, sum nakrantíð hevur verið í Vágsbotni.



*Eyðun Nólsøe og Terji Rasmussen hava ongantíð spælt fyri so stórari fjøld sum í Vágsbotni*





*Mong lýddu á tá Virðisløn Miðlahúsins varð handað á Nólsoyar Pálstorginum*